# Skeiva beinið




*Jákup á Borg var púra leysur longu eftir fimm minuttum, men tíverri fekk hann ikki nóg gott skot á*

**Jákup á Borg helt eftir dystin, at um stóri møguleikin hevði ligið til høgra beinið, so hevði úrslitið kanska verið eitt annað**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Jákup á Borg hevði uttan iva besta møguleikan at geva skotum ein ordans skelk, tá hann tíðliga í dystinum kom at standa væl fyri. Skotið megnaði skotski málverjin tíverri at beina bóltin út-

*Framhald á næstu síðu*






# Harður umgangur

*Framhald av síðu 20*

aftur, og eftir dystin kundi Jákup so bara iðra seg um hetta.

- Hann lág til vinstra beinið, og tað skal man helst ikki brúka til nógv annað enn at standa á. Nú veit eg ikki akkurát, hvussu fríur eg var, men Henrik helt eftir dystin, at eg hevði havt tíð at lagt hann yvir á høgra beinið, so tað var óluksáligt. Men tað gerst so ikki við.

- Tað, sum eg serliga iðri meg um, er tó at ikki fekk returbóltin. Tá rakti eg als ikki bóltin, sjálvt um hann lág til høgra, og tað var næstan verri.

Men hvussu var og ikki, so er Jákup framvegis maðurin, sum leggur upp til føroysku málini. Hesa ferð eftir horna, og tað fegnaðist hann eisini um.

- Julian gav mær í øllum førum eina vón, tá hann skoraði. Hann kom eisini beina leið yvir at siga, at tað var akkurát soleiðis, hann skuldi liggja, so tað var bara gott.

- Hatta var nakað, sum vit høvdu vant, men eg haldi nú eisini, at málverjin skuldi havt hann, men tað var ótrúliga gott skallað av Julian.

*- Vit høvdu roknað við, at teir komu við nógvari ferð. Teir spældu skjótari og runnu skjótari enn vit, so tað bleiv alla tíðina tungt, helt Óli Johannesen*



**Óli Johannesen helt, at talan hevði verið um ein av teimum heilt strævnu dystunum leygardagin. Ikki minst eftir málið, sum kom beint fyri hálvleik**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Ein av føroysku leikarunum, sum í stóran mun var í brennideplinum leygardagin, var Óli Johannesen. Sum verjuskipari roknaði hann við, at føroyska liðið kom undir trýst, og hesum fekk hann so sanniliga rætt í.

- Vit høvdu roknað við, at teir komu við nógvari ferð. Teir spældu skjótari og runnu skjótari enn vit, so tað bleiv alla tíðina tungt. Eisini dugdu teir væl at tøma øki fyri fólki, soleiðis at pláss bleiv at spæla.

Um nærdystirnar í dystinum helt Óli ikki, at har høvdu verið óvanliga nógvir.

- Sjálvandi vóru nakrir, men tað er tað, sum skal til. Teir mugu vit eisini royna at vinna. Eisini sjálvt um dómarin ikki altíð var í parti við okkum.

- Men sum heild haldi eg ikki, at hetta var okkara besti dagur. Eina løtu fáa vit rætta takið, og tá skora vit so eisini, og tí er tað stórt spell, at teir fáa mál somikið stutt undan steðginum. Tað er jú at fáa ein ordiligan frammaná. Høvdu vit hildið til hálvleik, so veit eg ikki, hvat kundi hent, men í øllum førum fór lagið hjá okkum nakað niður eftir hetta.

Mikudagin er tað so Litava, sum stendur fyri framman, og her tykist føroyski skiparin at hava so toluliga góðar vónir.

- Vit fara so altíð at royna at fáa stig, men lætt verður tað so ikki. Í Litava spældu vit einki serliga væl, og tá vístu teir, at teir megna at spæla heilt skjótt, so vit vita, at tað verður trupult.

Og tað at spæla tveir dystir innan somikið stutta tíð. Kann tað ikki gerast ein trupulleiki her?

- Nei. Tað skuldi tað ikki verði. Nú er kappingin hjá okkum komin somikið langt, so venjingarstøðan eigur at vera heilt í topp. So tað eigur ikki at vera ein trupulleiki, segði føroyski liðskiparin at enda.

# Jákup í fokus



*Eisini leygardagin var onkur fjeppari, sum vildi hava orðið á Jákup*

**Skotsku miðlarnir góvu føroyska málverjanum nógvan ans undan dystinum leygardagin**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk/álvur Haraldsen*

**Glasgow:** Undan dystinum leygardagin var Jákup Mikkelsen uttan iva maðurin, sum mest varð gjørt burturúr. Fleiri rásir høvdu drúgvar samrøður við føroyska málverjan, sum spælir í Skotlandi, og eitt nú hevði SkySport prát við málverjan sum upptakt til dystin.

Men tað var ikki bara sjónvarpið, sum hevði givið hesum ans. Eisini undir nógvu teimum seinastu venjingunum hevur Jákup hoyrt nógv frá liðfeløgunum, men sjálvur tóktist hann ikki leggja so nógv í hetta.

- Eg fekk mest sum alt fyri eitt at vita, at nú mátti eg royna at hjálpa Skotlandi eitt sindur, men tað varð sjálvandi sagt í skemti.

- Men annars er eitt heilt annað fokus á fótbólti her. Eitt nú nýtti eg ein heilan dag til BBC Prime og SkySport, og tað er bara stuttligt. Tað skapar jú eisini umtalu fyri Føroyar.

Men nú tú bert hevur sáttmála í eitt ár. Er hetta so ikki nakað, sum tú eisini kann brúka til at marknaðarføra teg sjálvan við?

- Soleiðis havi eg slettis ikki hugsað. Eg havi sum so bara roynt at verið blíður, og hevur tað ikki ligið alt for tvørt fyri, so havi eg játtað at verið við í innsløgum. Mítt avrik verður kortini mett eftir tí, sum eg geri á vøllinum.



MIÐLAGRAFIKARALÆRLINGUR SØKIST

Miðlagrafikari er tann nýggja grafikaraútbúgvingin. Lærutíðin er 4 ár og byrjar við einum ári á tekniskum skúla í Danmark. Vilt tú vita meira um miðlagrafikaraútbúgvingina, kanst tú lesa meira á www.yrkisdepilin.fo ella www.grafiske-uddannelser.dk.

Vit hugsa okkum eitt ungt, skapandi fólk, við góðum kunnleika í føroyskum, eisini vænta vit, at tú hevur kunnleika til arbeiði á teldu. Students- HF- ella HH-prógv er ein fyrimunur.

Á Hestprent kemur tú at umbróta bøkur, prentlutir og avísir, gera lýsingar, skanna á trumlu- og flatbedskannara, film og plátugerð og annars alt hugsandi grafiskt arbeiði.

Løn sambært sáttmálanum millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Vilt tú vita meira, so ring til Hestprent á 314 555 og spyr eftir Jon Hestoy.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Skrivlig umsókn til:**
Spf. Hestprent · att.: Jon Hestoy
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn

HESTPRENT

Tel: 314 555 · Fax: 318 026 · teldupost: hestoy@hestprent.fo

[illegible]